inni - trygt og ómaksleyst til hús



## Nýggj tvíhús – á Heygnum Mikla, Tórshavn

Nýggju snøggu tvíhúsini í gerð eru í 2 hæddum á uml. 90 fermetrar – í alt 180 fermetrar. Grundstykkið er góðar 300 fermetrar hvørt. Byggiár: 2007. Møguleiki er fyri at fáa ávirkan á nakað av tilfarinum. Í neðra er inngongd, gongd / hall, kamar og stórt fýrrúm / vaskirúm / kjallararúm, ið kann innrættast. Í erva er trappugongd / garderoba, hjúnarrúm, baðirúm, køkur / alrúm / borðsstova / stova. Húsini standa í vøkrum, veðurgóðum og friðarligum umhvørvi nær miðbýnum og hava sera gott útsýni oman yvir Havnina. Prísuppskot millum kr. 2.100.000,00 – 2.400.000,00 alt eftir, hvussu væl tey standa fyri.



## Summarhús – Dungagøta 5, Eiði

Húsini eru í 2 hæddum - og harafturat er úthús og hjallur. Samlað búvídd er uml. 40 fermetrar. Grundøkið er 56 fermetrar. Byggiár: 1930'ini. Húsini eru umvæld seinastu árini, m.a. eru vindeyguni og gólvini skift, brúsirúmið er nýgjørt og oljubrennarin er nýggjur. Í niðaru hædd er wc, køkur / stova. Í ovaru hædd er útiloft, hjúnarúm og kamar. Í úthúsinum er brúsirúm / vaskirúm / fýrrúm. Húsini standa niðarliga í bygdini í friðarligum umhvørvi. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



## Sethús – Neystarvegur 7, Streymnes

Húsini eru í 3 hæddum - samlað búvídd er 134 fermetrar. Grundøkið er uml. 280 fermetrar. Byggiár: uml. 1900. Húsini eru seinastu nógvu árini viðlíkahildin og umvæld. Húsini eru sera hugnalig. Gomlu plankagólvini eru niðurpussað, innveggir og undirsløg eru málað við ljósum litum, sum gevur ein hugnaligan dám. Í miðhæddini er durur, gongd, køkur, bryggers, stova og baðirúm. Í ovastu hædd er trappupallur og 2 kømur. Í niðastu hæddini er kjallararúm / fýr / vaskirúm. Húsini standa tætt við vegin og hava sera gott og frítt útsýni yvir bygdina. Sunnanfyri húsini er urtagarður við hugnaligum sólkróki. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



## Sethús – Brekkuvegur 17, Eiði

Húsini eru 3 hæddum - miðhæddin á 35 fermetrar, niðasta og ovasta hædd á uml. 30 fermetrar - í alt 95 fermetrar. Grundøkið er 115 fermetrar. Byggiár: 1910 / 2005. Øll miðhæddin, tak, tætt tróður, klædningur, bjálving, vindeygu, skorsteinur, ketil / oljufýr, miðstaðarhiti, vatn, el o.m.a. Hartil er sera snøggur snikkaragjørdur køkur og baðirúm við gosbað. Í miðhæddini er inngongd, durur, alrúm / stova / køkur, baðirúm. Í ovastu hædd er trappugongd / trappupallur og 2 kømur. Í niðastu hædd vaskirúm / fýrrúm / kjallararúm. Húsini, sum standa í veðurgóðum, friðarligum, hugnaligum og barnavinaligum umhvørvi, hava nakað av útsýni. Prísuppskot: kr. 500.000,00.



## Sethús – undir Fossum 54, Klaksvík

Húsini eru í 2 hæddum - samlað búvídd 270 fermetrar. Grundøkið er 540 fermetrar. Byggiár: 1978. Húsini eru stoypt, klødd við timbur, hava eternittak og íbúð er í neðra. Í erva er durur, bryggers, gongd, køkur, stór stova, baðirúm, hjúnarrúm, 2 kømur og skrivstova. Í neðra er kjallararúm, vaskirúm / fýrrúm og hjallur. Í íbúðini er stórur durur, gongd, baðirúm, hjúnarrúm, køkur / stova og kamar. Garður / urtagarður er lutvíst runt húsini. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



## Stór sethús - Fútalág 36, Tórshavn

Húsini eru í 3 hæddum - samla búvídd er uml. 250 fermetrar. Grundøkið er 586 fermetrar. Byggiár: 1971. Húsini eru so við og við dagførd og eru í besta standi. Í miðhæddini er trappugongd / hall, stova við útgongd til stóra terassu, borðstova / køkur, grovkøkur, bryggers / vaskirúm, skapsrúm, hjallur við útgongd til snóratræ, millumgongd, baðirúm og hjúnarrúm. Í ovastu hædd er trappupallur, stova / alrúm, hjúnarrúm, 2 kømur, baðirúm. Í niðastu hædd er inngongd, gongd / trappa / hall, fýrrúm / kjallararúm við egnari inngongd og goymslurúm. Hartil er bilskúrur og góð parkeringsviðurskifti. Húsini standa sera væl fyri mitt í Havn í veðurgóðum, friðarligum, náttúruvøkrum og barnavinarligum umhvørvi og hava góðan sólargang og sera gott útsýni yvir allan fjørðin. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



## Sethús – Gerðisvegur 1, Leirvík

Húsini eru í 2 hæddum - samlað búvídd 236 fermetrar. Grundøkið er 616 fermetrar. Byggiár: 1982. Húsini eru stoypt heilt upp, klødd við timbur millum vindeyguni og hava stáltak. Í erva er durur, 2 baðirúm, gongd, køkur / stova, hjúnarrúm, 2 kømur og stór terassa. Í neðra er uppihaldsstova við brenniovni, kamar, stórt spælirúm, kjallararúm, fýrrúm / vaskirúm umframt ein garaga. Húsini standa við høvuðsvegin mitt í bygdini. Hugnarligur urtagarður er runt húsini. Tey verða seld, um hóskandi boð fæst.



## Sethús - Ovari Vegur 40, Leynar

Húsini eru í 2 hæddum - samlað búvídd er 220 fermetrar umframt ein garaga á 27 fermetrar. Byggiár 1988. Grundøkið er 575 fermetrar. Húsini eru arkitekteknað og sera búvinarlig ("anvendelig") Tey eru orkusparandi, hava flagtak, hitapumpu umframt miðstøðuhita. Í ovaru hædd er køkur / borðstova, grovkøkur, stór stova, hjúnarúm, gongd, baðrúm, klædnarúm og hjallur. Í niðaru hædd er durur, fýrrúm, 3 kømur, gongd, baðrúm og kjallararúm. Húsini eru sera snotilig, standa í barnavinarligum, hugnligum umhvørvið og hava gott útsýni út á sjógv, og bert 20 minuttir eru til Havnar. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



## Sethús – Janstovugøta 26, Tórshavn

Húsini eru í 3 hæddum - hvør á 60 fermetrar - í alt 180 fermetrar. Grundøkið er 120 fermetrar. Byggiár: 1956 / 1997. Har er nýtt tak, klædningur, vindeygu, køkur, baðirúm, hjallur og øll niðara hæddin er dagførd. Í miðhæddini er hjallur, inngongd, gongd, baðirúm, matarkøkur, borðstova / stova. Í ovastu hædd er trappugongd, hjúnarrúm við útgongd til stóran svala við nakað av útsýni, baðirúm og 3 kømur. Í niðastu hædd er inngongd, gongd, 2 kømur, baðirúm og vaskikjallari. Húsini standa í veðurgóðum og friðarligum umhvørvi í miðbýnum nær við handlar, SMS, skúlar, dagstovnar, ítróttarøki, viðarlund o.m.a.



## Sethús – Brekkuskáki 7, Klaksvík

Húsini eru í 2 hæddum - hvør hæddin er góðar 130 fermetrar, samlað búvídd er góðar 260 fermetrar. Grundøkið er 451 fermetrar. Byggiár: 1949. Húsini eru stoypt og klødd við alminiumplátum, takið er úr tjørupappi og varð skift í 2003. Í erva er durur, gongd, køkur, 2 stovur, 3 kømur, baðirúm og hjúnarúm. Í neðra er kjallararúm / fýr / vaskirúm og goymslurúm. Í íbúðini, sum er í neðra, er durur, køkur / stova, gongd, kamar, baðirúm og hjúnarrúm. Húsini standa mitt í býnum og hava sera gott útsýni. Garður er runt húsini. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



## Sethús – undir Heygnum 11, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum - hvør á uml. 90 fermatrar - í alt uml. 180 fermetrar. Grundøkið er 400 fermetrar. Byggiár: 1960. Húsini eru nærum viðlíkahaldsfrí. Tak, klædningur, vindeygu, inndekningur og køkur í neðra frá mið 80'unum. Baðirúm og nýtt á gólvini í 2004. Niðara síða bjálvað og klødd við timbur og aluminium 2005. Í ovaru hædd er inngongd, durur, gongd / trappugongd / garderoba, matarkøkur / stova, hjúnarrúm við útgongd til stóran svala / terassu, baðirúm og 2 kømur. Í niðaru hædd er inngongd, durur, gongd, stova, køkur, baðirúm, kamar, vaskirúm / fýrrúm og stórur hjallur. Garður / urtagarður er runt húsini, sum eru hugnalig og charmerandi og standa í friðarligum og veðurgóðum umhvørvi við hampiligum útsýni og góðum grannalagi. Stutt er til dagstovn og gott busssamband. Prísuppskot: kr. 2.000.000,00.



## Grundøki – Hóvabrekka 4, Argir

Ognin er eitt grundøki á 633 fermetrar, ið liggur sera væl fyri á Argjum. Grundstykkið liggur í náttúruvøkrum, friðarligum, barnavinaligum og veðurgóðum umhvørvi við sera góðum útsýni yvir Havnina og fjørðin. Grundøkið verður selt, um hóskandi boð fæst.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni

Sosialurin 341800